Tunnilin ímillum Hov og

# Øravík lagdur fyri løgtingið

**Bjarni Djurholm hevur nú biðið Løgtingið um loyvi at fara undir arbeiðið at gera Hovstunnilin. Fyrst í september skal vera klárt at bora**

HOVSTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Málið um at gera tunnil ímillum Øravík og Hov í Suðuroy er lagt fyri løgtingið.

Ætlanin hevur alla tíðina verið at tunnilin skal gerast, men áðrenn arbeiðið kann setast ígongd, má Løgtingið geva landsstýrismanninum í vinnumálum heimild til at seta arbeiðið í verk.

Tí legði Bjarni Djurholm týsdagin eina verklagslóg fyri Løgtingið, har hann biðjur um loyvi til at gera Hovstunnilin og tilhoyrandi vegir og at brúka í mesta lagi 150 milliónir krónur til endamálið.

### Fáa betri tunnil

Tankin um tunnil ímillum Suðuroy og Hov, er ikki heilt nýggjur.

Í seinnu helvt av nítiárunum vórðu jarðfrøðiligar kanningar og royndarboringar gjørdar í økinum, og útfrá úrslitinum av teimum, var ein linjuføring stungin út í kortið.

Í 2001-2002 vórðu tunnil og vegir báðumegin við projekterað, og tá var ætlanin at gera inntøkini í 2002.

Men hetta varð av ongum, tí áðrenn gongd kom á arbeiðið, var tankin setur fram um eina nýggja linjuføring væl lægri í lendinum, men í einum jarðfrøðiliga truplum øki.

Men av tí at henda linjuføring bæði samfelagsliga og ferðslutekniskt liggur betri, og at tøknin er nógv ment, varð avgjørt at kanna nýggju linjuføringina í samstarvi við jarðfrøðingar og aðrar ráðgevarar.

Neyðugar forkanningar og metingar vórðu gjørdar í nýggja økinum í 2004 og útfrá tí varð so ein nýggj linjuføring stungin út í kortið.

Projekteringin er farin fram í endanum av 2004 og byrjanini av 2005.

### Tunnilin 2.437 metrar langur

Nú tunnilin skal gerast, er talan um eina verkætlanin upp á tilsamans 4.677 metrar av tunli og vegum.

Sjálvur tunnilin verður 2.437 metrar langur. Men Øravíkarmegin skulu 1.790 metrar av vegi dagførast og gerast av nýggjum og Hovsmegin skulu 450 metrar av vegi gerast av nýggjum.

Øravíkarmegin verður innslagið í Tjaldarvíksbrekkum og Hovsmegin undir hamarinum við Torvsheygg, sum er einar 200 metrar í ein útnyrðing, har landsvegurin fer um Hovsá.

Tunnilin verður 9,5 metrar breiður í neðra og vegurin í honum verður 7 metrar breiður. Vegirnir til tunnilin vera 7 metrar breiðir við 1,25 m breiðari vegøksl á hvørjari síðu.

Arbeiðið at gera tunnil og vegir skal bjóðast út. Bjarni Djurholm sigur, at ætlanin er at útbjóðingartilfarið skal vera liðugt mitt í apríl og fyrst í september skal tað verða klárt at byrja upp á sjálvan tunnilin.

Á fíggjarlógini í ár eru 31 milliónir krónur settar av til endamálið. Tað stóra takið verður næsta ár, tá ið tað verður neyðugt at seta 75 milliónir krónur av til arbeiðið, men so verður aftur neyðugt at seta 44 milliónir av í 2007.

Løgtingið fer at viðgera málið í næstum.



*Fyri at tað skal ganga so skjótt sum gjørligt, eru longu fleiri hol grivin Øravíkarmegin at kanna lendið fyri at vita akkurát, hvar tað er frægast at gera inntakið til tunnilin. Hetta arbeiðið varð gjørt í farnu viku*

# Vágur skal vera nummar eitt um fimm ár

**Ì 2010 skal Vágur verða í fremstu røð. Tað er endamálið við eini víðfevndari menningarætlan, sum fer av bakkastokki í kvøld**

MENNINGARÆTLAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Visjón 2010.

Tað er heitið á eini stórfingnari menningarætlan fyri Vágsbygd.

Endamálið við hesi menningarætlan er líka stórfingið, sum navnið á henni. Og tað er, at í 2010 skal Vágur verða í fremstu røð.

Hetta málið skal røkkast við einum neyvum og miðvísum samstarvi ímillum Vágs Kommunu, fyritøkur, stovnar, felagskapir, áhugabólkar og einstaklingar í Vági.

Í eina tíð hava Vágs Kommuna og granskingardepilin fyri økismenning lagt menningarætlanina til rættis.

Og startskotið til hesa menningarætlan verður latið av í kvøldklokkan 18, tá ið almennur fundur verður í Framtíðini í Vági, har tey fara at greiða frá ætlanini.



*– Skal gongdin í Vági vendast, mugu vábgingar sjálvur gera og tað er neyðugt at arbeiða á øllum økjum bæði á vinnuliga, mentanarliga og kommunala økinum, sigur Annlis Bjarkhamar, sum verður samskipari fyri menningarætlanina, til gongd er fingin á arbeiðið*

Ein leiðslubólkur er settur at stíla fyri og í honum sita býráðspolitikararnir, Kirstin Strøm, borgarstjóri, Ásgerð Stenberg, varaborgarstjóri og býráðslimirnir Jógvan Krosslá og Sølvi Andreasen. Sostatt er ein býráðslimur fyri hvønn flokk við í leiðslubólkinum.

Afturat teimum eru so Dennis Holm í granskingardeplinum fyri økismenning og Annlis Bjarkhamar í leiðslubólkinum.

### Skapa samstarv og byggja brýr

Talan er um eina menningarætlan í 18 punktum. Talan er um 18 verkætlanir, sum ymsir bólkarskulu arbeiða miðvíst við hesi komandi fimm árini.

Hvør bólkur fær ein ítøkiligan arbeiðssetning at arbeiða við og her er talan um verkætlanir á øllum samfelagsøkjum, bæði á vinnuliga økinum, kommunala økinum og mentanarliga økinum.

– Skal fólkið trívast í einum øki, er tað sjálvsagt neyðugt at hava arbeiðspláss, bæði til faklærd og til ófaklærd. Men mentanartilboð og frítíðartilboð annars eru eisini neyðugir fyri at skapa trivnað í einum øki og fyri at fáa fólk at støðast, sigur Annlis Bjarkhamar sum er samskipari í leiðslubólkinum, til rættilig gongd er fingin á arbeiðið.

Tey eru eisini sannførd um, at tað hevur alstóran týdning, at so nógv fólk sum gjørligt taka lut í teimum ymisku verkætlanunum og tí vóna tey, at so nógv, sum gjørligt møta á fundinum í Framtíðini klokkan 18 í kvøld.

– Vit vóna sjálvsagt at so nógvar vágbingar sum gjørligt við vitan á ymsum økjum, eru sinnaðir at verða við í verkætlanini og vilja vera við í teimum ymsu arbeiðsbólkunum, sigur Annlis Bjarkhamar.

– Endamálið við allari menningarætlanin er at fostra nýggj hugskot, at nýggjar verkætlanir síggja dagsins ljós, at nýggj samstørv verða ment og at brýr verða bygdar millum vinnuna, felagsskapir, áhugabólkar og einstaklingar í Vági.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sigur, at Býráðið er farið at arbeiða við hesi ætlanini, tí tað er neyðugt at vágbingar sjálvir taka stig til at venda gongdini og ikki sita hendur í favn.

– Tað er ikki yvir at dylja, at Vágbingar hava ikki so gott orð á sær, tí nógv halda, at vit bara grenja. Tí má ímyndin av Vági broytast og tí er tað neyðugt at vit sjálvi taka stig til at venda gongdini, sigur borgarstjórin.

– Vit mugu sjálvi ávirka framtíðina, tí vit kunnu sita afturá og bara bíða eftir at onkur annar tekur neyðugu stigini fyri okkum, leggur hon afturat.

Nú verður nógv tosað um samstarv ímillum kommunur og ímillum vinnulív. Hví verður ein slík menningarætlan ikki gjørd fyri alla oynna?

– Tað er neyðugt virka í lokaløkinum, men tað er ongin sum forðar teimum ymsu arbeiðsbólkunum at fara útum kommunumark og enntá útum landodd-arnar, fyri at skapa samstarv, sigur Kirstin Strøm Bech.

Hon vónar, at vágbingar halda seg framat og melda seg til at vera við í arbeiðinum.

### 18 verkætlanir

Tær 18 verkætlanirnar, sum skulu fáa Vág í fremstu røð aftur um fimm ár, eru:

- Vágur skal vera miðdepilin fyri sjóvinnutænastur
- Lokal førleikamenning
- Bøta um ímyndina av Vági
- Styrkja um tænastur og tilboð til ferðavinnuna
- Ferðavinnuverkætlan: Johanna TG 326
- Betri og fjølttáttað mentanar- og frítíðartilboð
- Vágur á Føroyakortið
- Samstarv millum fiskiskip, fiskaframleiðarar og fiskaútflytarar
- Vágur, reinasti býur í landinum 2008
- Menning av skúla- og útbúgvingartilboðum
- Ein tryggan og mennandi uppvøkstur
- Styrkja tilknýtið hjá ungdóminum til Vág
- Hugskotsfundir: Nýggjar vinnur, gongd á aftur
- Ígongdsetararstuðul og Vinnuráðgevingarstova
- Fjølttáttað frítíðarundirvísing
- Støðug betran av kommunalum tænastum
- Kappróðrarneyst og Grindabátasavn
- Fjølttáttað tilboð til børn og ung: Framhald av verkætlanini Skapandi Spírar